VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin: Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið hósdagin: Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin regn. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið fríggjadagin: Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið. Ælingur, partvís kavi og hitin millum 3 og 6 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin: Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Hitin um 5 stig. Sunnudagin strúkur í vindi av útnyrðingi og ælingur, sum frálíður kavi. Hitin um frostmarkið.

Læknaskrivarar eru í mest strongda fakbólkinum

Fyrr í mánaðinum skipaði Læknaskrivarafelag Føroya fyri eftirútbúgvingarskeiði í "Stress og fyribyrging av hesum", "Coaching" og "Supervisión á Hotel Vágum

SKEIÐ
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Undirvísari var Ásvør Skaalum, sálarfrøðingur við eftirútbúgving innan processráðgeving á arbeiðsplássum.

Skeiðleiðari var Sæunn Ólavsdóttir Hansen.

Endamálið við eftirútbúgvingarskeiðnum var at stuðla og menna læknaskrivararnar

fakliga so væl sum persónliga.

Arbeiðið hjá læknaskrivarum verður alt meira fyriskipandi og samskipandi.

- Við atliti til Talgildu Heilsuskipanina, sum nú verður implementerað á Landssjúkrahúsinum, er umráðandi, at læknaskrivararnir tillaga seg ávísar trupulleikar hesum viðvíkjandi, sigur Læknaskrivarafelagið í tíðindaskrivi.

Tað er stórur tørvur á læknaskrivarum. Í løtuni eru tríggir undir útbúgving sum læknaskrivarar, og ætlanin er at taka tríggjar inn afturat 1. september í ár.

Ein kanning, sum "Det nationale Forskningsinstitut" fyri Arbeiðsumhvørvi hevur

gjørt, sýnir, at læknaskrivarar og læknar eru millum teir 10 fakbólkarnir, sum eru mest strongdir.

Á skeiðnum hjá Læknaskrivarafelagnum á Hotel Vágum vóru 46 luttakarar.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-5
Nuuk	-4
Qaqortoq	3
Ammassalik	-7
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	-3
Seyðisfjørður	-1
Tórshavn	2
Lerwick	3
Aberdeen	4
London	9
Tromsø	--
Bergen	2
Oslo	--
Stokkhólm	0
Keypmannah.	3
Helsinki	-6
Moskva	-6
Berlin	6
Warzawa	0
Kiev	-5
Bukarest	3
Paris	9
Madrid	12
Róm	15
Malorca	15
Athen	11
Malta	17
Tunis	16
Beijing	7
New Dehli	24
Bangkok	32
Jakarta	31
Sydney	--
New York	1
Miami	26
Los Angeles	14
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	--
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	28

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt stormlágtrýst, 953 hPa. skamt vestan fyri Føroyar fer spakuliga vestureftir og grynnist. Brúgvalagið til Føroya fer norðureftir.



Í dag:
Lágtrýstini við Ísland fara spakuliga vestureftir og grynnast. Sunnan fyri lágtrýstini rekur køld luft av vestri móti Føroyum

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 26/2 kl. 06^{00}– 27/2. 06^{00}. Hitin í gjár: 3,1°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 05/2 kl. 06^{00}– 06/2 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í mars: 12,0 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

VESTFALLSKYRRINDI

19. februar	Mánin næstur jørðini
24. februar	Fyrra kvarter
3. mars	Fullmáni
7. mars	Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
6. Mars	08.16	20.36	07.16	19.36	07.31	19.51	10.16	22.36	11.16	23.36	06.31	18.51	05.31	17.51	08.31	20.51	09.31	21.51	08.01	20.21	09.16	21.36
7. Mars	08.56	21.13	07.56	20.13	08.11	20.28	10.56	23.13	11.56	-	07.11	19.28	06.11	18.28	09.11	21.28	10.11	22.28	08.41	20.58	09.56	22.13
8. Mars	09.31	21.50	08.31	20.50	08.46	21.05	11.31	23.50	00.13	12.31	07.46	20.05	06.46	19.05	09.46	22.05	10.46	23.05	09.16	21.35	10.31	22.50
9. Mars	10.09	22.29	09.09	21.29	09.24	21.44	-	12.09	00.50	13.09	08.24	20.44	07.24	19.44	10.24	22.44	11.24	23.44	09.54	22.14	11.09	23.29
10. Mars	10.49	23.11	09.49	22.11	10.04	22.26	00.29	12.49	01.29	13.49	09.04	21.26	08.04	20.26	11.04	23.26	-	12.04	10.34	22.56	11.49	-

GEVID BLÓÐ